# Landsbankin skal halda fingrarnar burtur

*Nevndin í Føroya Banka Finnur seg ikki í, at Landsbanki Føroya fær heimild til, t. d. at vera bankasamband fyri kommunurnar, tí tað er at vera kappingarneyti hjá peningastovnunum. Hetta passar ikki saman við leiklutinum hjá Landsbankanum eftirlitsstovnur hjá peningastovnunum, stendur í frágreiðingini frá nevndini til aðalfundin*

Sveinur Tróndarson

Føroya Banki hevði aðalfund í gjár har roknskapurin varð lagdur fram og góðkendur.

Úrslitið var enn einaferð eitt sera stórt avlop og saman við avlopunum undanfarnu árini hevur bankin vunnið sær eina sera stóra eginogn upp á knappliga 1,1 milliard krónur.

Men tað vóru ikki bara vøkur orð, sum vórðu at hoyra á aðalfundinum í gjár.

Nevndin hevur sítt at finnast at, og á fleiri økjum er hon beinleiðis ósamd við eigara sínum, Føroya Landsstýri.

### Tann øvugta verð

Í sambandi við, at Landsbankin hevur arbeitt við eini ætlan um loysn av kommunuskuldini, sigur nevndin í Føroya Banka, at teir halda tað verða púra burturvið, at kommunuskuldin verður fíggjað við útlendskum kapitali.

Landsbankin hevur saman við Unibank Danmark gjørt eina ætlan um umfíggjing av skuldini hjá kommununum, og tað, sum eftir øllum at døma liggur í kortunum er, at tað skal stovnast eitt kommunalt kreditfelag. Hetta er ikki ókent aðrastaðni, men tað pilkar av álvara við virkisøki hjá føroysku peningastovnunum og tryggingarfeløgunum.

Tað, sum eftir øllum at døma gongur nevndini í Føroya Banka ov nær er, at tað politiskt er eitt ynski um, at kommunurnar skulu takast frá bankunum so at siga.

Føroysku lániveitararnir vórðu als ikki spurdir, tá uppskotið um nýggja kommunuavtalu vóru gjørd, og tað heldur nevndin vera løgið.

Bankin heldur, at teir framhaldandi eru best førir fyri at veita kommununum eina lagaliga fígging, og gongur tí beint móti metingunum hjá løgmanni og Landsbankanum.

Hesir partar meta, at ringast stæddu kommunurnar fara at hava ilt við at fáa eina líkinda fíggin, um ikki allar kommunurnar vera saman um tað.

### Trupul tvístøða

Nevndin í Føroya Banka heldur tað eisini vera serstakliga óheppið, at landsbankin, sum hevur boðið sær til, at hava eftirlit við føroyska gjaldførinum, samstundis fer út um landoddarnar eftir peningi til kommunuskuldina.

– Føroyska gjaldføri stendur at bresta sum er og kortini ætlar landsbankin, um hann fær sín vilja, at oysa enn meiri pening inn í búskapin.

Tað, sum býr í uppskotinum er eftir øllum at døma eitt politiskt ynski at gera ein kommunalan lánistovn, soleiðis, at landsbankin kann hava eftirlit við kommunalu lánunum.

Kommunurnar hava í nógv harrans ár verið trúgvir kundar hjá føroysku peningastovnunum og hóast myndugleikarnir hava havt eftirlit við lánunum hjá kommununum, so hevur hetta eftirlit eftir øllum at døma ikki verið nóg gott.

Hjá føroysku peningastovnunum merkir broytingin, at teir skulu í beinleiðis kapping við landsbankan um almennu kundarnar og tað heldur nevndin ikki er rættvíst.

– Er politiskt ynski um, at vit skulu hava ein peningastovn afturat, so biðja vit um, at kappingin fer fram á jøvnum føti. Tað ber í sær, at landsbankin má gjalda sínar útreiðslur burtur av einum bruttovinningi, sum er vunnin í fríari kapping, at hann ikki kann mótrokna rentutap og útreiðslur í rentuni hjá innlánarum, at eingin við lóg verður forðaður í frítt at velja peningastovn, og at landsbankin má rinda skatt eins og peningastovnarnir.



– Skal landbankin vera banki hjá peningastovnunum, so skal hann ikki samstundis kappast við okkum, sigur nevndin í Føroya Banka í frágreiðing síni til aðalfundin

### Upplýsingarskylda

Nevndin í Føroya Banka ger eisini vart við, at tað er sera óheppið, at samstundis, sum landsbankin fær møguleika at kappast við peningastovnarnar, so verður eisini álagt teimum óavmarkað upplýsingarskylda.

Hetta halda teir kann ikki vera rætti vegurin at fara, tí talan er um, at peningastovnarnir skulu lata einum kappingarneyta tilvildarligar viðvæmar upplýsingar.

Tí heldur nevndin í Føroya Banka, at landsstýrið eigur at staðfesta, hvat tað vil við landsbankanum.

Skal hann vera landsbanki, so er hansara uppgáva at vera peningastovnur hjá peningastovnunum. Og skal hann røkja henda leiklut í trúvirði, ber ikki til, at hann samstundis vil reka handilsligt bankavirksemi í beinleiðis kapping við privatu peningastovnarnar.

# Argjaskótar stovnað bjargingarfelag

*Sjey ungir mans á Argjum, hava stovnað eitt bjargingarfelag, sum hevur fingið navnið BjArgir. Felagið er farið til verka og hóast menninir eru sera ungir, so halda teir kortini, at teir kunnu rætta eina hjálpandi hond tá á stendur. Fyri at vera til reiðar, hava teir allir tikið fult fyrstuyhjálparskeið hjá Reyða Krossi*

Sveinur Tróndarson

Fyri umleið trimum mánaðum síðani stovnaðu sjey knassar á Argjum sítt egna bjargingarfelag. BjArgir eitur felagið, og gløggi lesarin hevur longu sæð orðaspælið hjá hesum unglingunum.

Tí talan man vera um tað bjargingarfelagið í landinum, sum hevur lægsta miðalaldurin. Yngsti maðurin er 16 og tann elsti verður 21 ár um ikki so langa tíð.

Men dirvinum bagir einki og sjálvir halda teir ikki, at teir eru ov ungir til bjargingararbeiði.

### Væl útbúnir

Ungu monnunum er hjálparabeiði ikki fremmant. Teir hava allir verði skótar og av tí, at teir nú eru ov gamlir til tað, vildu teir fegnir í holt við okkurt annað.

Bárður Højgaard, talsmaður hjá nýggja bjargingarliðnum sigur, at nógv av tí teir teir hava tikist við hjá skótunum minnir um bjargingararbeiði og tí eru teir rættuliga væl fyri.

– Vit hava m. a. sigi nógv hjá skótunum og so hava vit sjálvandi eisini góðan kunnleika til fyrstuhjálp frá skótunum.

*Men er tað nóg mikið. Er tað ikki eitt sindur næsadjarvt av so ungum monnum, at bjóða seg fram til bjargingararbeiði?*

– Tað halda vit ikki, tí vit hava, allir sjey, tikið fyrstuhjálparskeiðið hjá Reyða Krossi. Grundskeið, víðkað skeið og sálarliga fyrstuhjálp. Tí eru vit rættuliga væl fyri í so máta. Aldurin hevur ikki so nógv at siga. Hinvegin kundi ein sagt, at tað er gott at fáa ung fólk upp í bjargingararbeiði, ístaðin fyri at lata tey eldru taka sær av tí. Tí tað eru fyrimunir við at hava yngri fólk við. Tey eru t. d. lættari á beinunum og tað kann vera ein fyrimunur, tá leitað verður í haganum, sigur Bárður Højgaard.

### Útgerð fáast til vegað

Tað er ikki bara sum at siga tað, at byrja nýtt bjargingarfelag. Nógv skal fáast til vega av útgerð og klæðum, og tað er ikki kostnaðarleyst. Minni enn so.

Tað eru ungu menninir greiðir yvir, og tí hava teir eisini sett sær sum mál, at byrja í smáum at útvega.

BjArgir skal ikki setast í skuld fyri at fáa útgerðina og tí ætla bjargingarmenninir at savna pening til útgerðina.

– Vit skulu í fyrsta umfari hava klæðir, ryggsekkir, fyrstuhjálparútgerð og børu og til tað skulu vit hava fatur á umleið 30 túsund krónur.

*Hvussu kemur hesin peningur til høldar?*

– Vit ætla okkum at gera ein sponsoreraðan »hike« av Selatrað til Syðradals, tann longsta vegin. Talan er um ein tein, sum er 120 kilometur, og fáa vit t. d. fólk at gjalda eina krónu fyri kilometurin, so eru 120 krónur í kassanum frá hvørjum. Upphæddin í sær sjálvum er tá ikki so stór, men hon munar væl í kassanum hjá okkum, sigur Bárður.

Hann er greiður yvir, at tað neyvan fer at eydnast teimum at fáa allar 30 túsund krónurnar í einum tiltaki, og tí hava teir eisini hugsað um møguleikan at søkja um stuðul.

### Gott tiltak

Hóast tað er eitt bjargingarfelag í Havn og eisini er vælútgjørd brandstøð, so hevur bjargingarfelagið hinumegin Sandá verið BjArgir ein góður stuðul, sigur Bárður.

– Vit hava fingið góðan moralskan stuðul frá teimum í fyrireikingunum og tað hevur givið okkum dirvið til at halda á, sigur hann.

Jógvan Jensen, sum starvast hjá tilbúgvingarverkætlanini sigur, at tað sjálvandi er at frøast um, at ungfólk vilja sleppa upp í bjargingararbeiði.

Hann vísir á, at tað er tað sjálvbodna arbeiðið, sum er beinagrindin í øllum bjargingararbeiði, og tí er tað serliga gleðiligt, at fleiri leggjast til.

– Teir hava tosað við okkum og vit hava roynt at ráðgivið teimum eftir førimuni, sigur Jógvan Jensen.

Spurdur um miðalaldurin í nýggja bjargingarfelagnum ikki er í so lágur, sigur hann, at aldurin ikki nýtist verða nøkur forðing.

– Eingin sigur, at teir skulu verða í meldrinum frá byrjan, men tá teir eru við, læra teir samstundis eisini hvussu tað arbeiði fer fram. Vit hava greitt teimum frá nøkrum praktiskum tingum viðvíkjandi tilbúgving og tað er ætlað sum ein hjálp so teir koma í gongd. Sum sagt, so er tað gott við sjálvbodnari arbeiðsmegi, sum er beinagrindin í bjargingararbeiði yvirhøvur, sigur Jógvan Jensen.



*Sjey »gamlir« skótar á Argjum hava stovnað bjargingarfelagið BjArgir. Her síggjast fýra av stovnarunum í nýggja felagnum, sum er farið til verka*
**Mynd: Jens Kr. Vang**

Nýggja bjargingarfelagið heldur til í kirkjuni á Argjum, har skótarnir eisini halda til, og har venja teir eisini, tað sum til ber at venja innandura.

Teir hittast í kirkju- og missiónshúsinum á Argjum hvørt týskvøld klokkan 19.30.





*Í Føroyum eru prestagarðarnir statsogn. Tað merkir millum annað í praksis, at so at siga alt, sum inni stendur, er pivatogn hjá presti. Til dømis skrivstovuútgerðin, hann nýtir í sínum arbeiði.*

# Kirkjulógir uttan heimildir

*Kirkjulógirnar, sum settar eru í gildi í Føroyum, kunnu ikki nýtast til fulnar, tí rundskriv og kunngerðir mangla*

Edvard Joensen

Tað er tvístøða komin í viðvíkjandi teimum kirkjulógunum, sum settar eru í gildi í Føroyum. Tær kunnu ikki brúkast, sum tær eru settar í gildi, tí tær kunngerðir og tey rundskriv, sum skulu fylla rammurnar út, eru ikki gjørd, sigur formaðurin í Prestafelagnum í Føroyum, Jákup Reinert Hansen, sandoyarprestur.

Prestafelagið hevði aðalfund fyrr í vikuni. Nevndin í felagnum var afturvald á aðalfundinum. Í nevndini sita Jákup Reinert Hansen, prestur í Sandoyar prestagjaldi, sum er formaður. Sonja Klein, prestur í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi, er nevndarlimur. Uni Næs, prestur í Fuglafjarðar prestagjaldi frá 1. apríl, er álitismaður. Og Bergur Debes Joensen, prestur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi, er tiltakslimur.

Jákup Reinert Hansen, formaður í Prestafelagnum í Føroyum, sigur, at føroyska felagið í grundini bara er ein deild í danska prestafelagnum. Soleiðis velja føroysku prestarnir umboð at fara á aðalfund í danska prestafelagnum, sum verður í mai mánaða. Tað plagar at vera formaðurin, sigur Jákup Reinert Hansen.

Á hesum aðalfundinum verða vanlig fakfelagsmál viðgjørd. Eitt nú lønarspurningar, sigur Jákup Reinert Hansen. Fólk halda kanska, at prestar bara viðgera andalig mál. Men sum rímuligt er, skal løn til eisini hjá presti.

### Dáma ikki ískoytini

Tað er soleiðis, sigur Jákup Reinert Hansen, at staturin vil hava lønina býtta sundur soleiðis, at ein partur verður føst løn, meðan ískoyti av ymsum slagi so verða latin. Til dømis nevnir hann bústaðarískoyti, sum verður latið fyri at fáa prestar at búgva á støðum, har annars ringt tykist at vera at fáa teir at støðast. Eitt sonevnt »belastnings« ískoyti er eisini upp á tal. Tað skal latast prestum, sum hava nógv at gera. Eitt nóg stórt prestagjald ella tílíkt. Og soleiðis eru tey fleiri, sigur sandsprestur.

Men prestunum dámar ikki hesi ískoytini. Teir halda, at grundlønin skal vera so høg sum møguligt, so tað slepst undan at býta prestarnar upp í bólkar, har tað kanska endar við, at teir verða løntir eftir úrsliti á forrætningshátt. Og tað kann ikki vera meiningin, heldur sandsprestur.

Tað eru 28 limir í Prestafelagnum í Føroyum. Av hesum eru onkrir, sum eru útbúnir teologar, men ikki arbeiða sum prestar.

Tað eru í løtuni 21 pestastørv í Føroyum, sigur Jákup Reinart Hansen. Eitt hálvt starv er á veg við Havnar Kirkju, so tá verða 22 prestar í starvi.

Í løtuni verður søkt eftir prestum á Glyvrum og í Vestmanna, og væntandi verður eitt starv leyst í Vági eisini. So er tað tað, sigur sandsprestur, hvør søkir hesi størvini. Verða tað prestar, sum eru í øðrum starvi í Føroyum í løtuni, verður aftur eitt hol har.

Annars er tað soleiðis, at um kirkjuráðini halda, at ov fáar umsóknir eru, kann starvið lýsast av nýggjum. Men er ein meirilutainnstilling gjørd, hevur Kirkjumálaráðið skyldu at fylgja henni.

### Prestagarðarnir

Í Danmark er tað soleiðis, at kirkjuráðini eiga prestagarðarnar og kunnu so gera við teir, sum tey halda vera fyri neyðini. Í Føroyum eru prestagarðarnir statsogn. Tað merkir millum annað í praksis, at so at siga alt, sum inni stendur, er pivatogn hjá presti. Til dømis skrivstovuútgerðin, hann nýtir í sínum arbeiði.

Tað munnu vera fáar almennar skrivstovur í dag, har starvsfólkið sjálvt leggur innbúgv og maskinur til, sigur sandoyarprestur, Jákup Reinert Hansen, formaður í Prestafelagnum í Føroyum.

Men í hansara egna føri er tað soleiðis, at staturin eigur eina brandboks at goyma kikjubøkurnar í og eina kopimaskinu. Alt annað á skrivstovuni eigur hann sjálvur. Teldur og aðrar hentleikar, sum prestarnir brúka til arbeiðis, eiga teir privat. Við onkrum heilt einstøkum undantaki, sigur Jákup Reinert Hansen.

Tað hevur ikki verið heimild í kirkjulógunum, sum galdandi hava verið í Føroyum, at kirkjuráðini hava havt loyvi til at brúkt pengar upp á prestagarðarnar. Men tað er tað nú, nýggju lógirnar eru settar í gildi. Tó mangla enn tær kunngerðirnar og tey rundskrivini, sum skulu geva kroppinum lív. Tað vil siga, fáa lógirnar at virka.

Arbeitt verður í løtuni við at yvirtaka fólkakirkjuna, sigur Jákup Reinert Hansen. Ein nevnd er sett at arbeiða við hesum málinum, og nevndarformaðurin væntar at nevndin hevur eitthvørt úrslit longu í summar.

Kunnað varð um hetta málið á aðalfundinum hjá Prestafelagnum í Føroyum.

### Tilbúgvingarætlanir

Eitt annað øki, prestarnir eru við í, eru tær tilbúgvingarætlanir, sum skipaðar verða kring landið.

Fyrr var tað so, sigur Jákup Reinert Hansen, at ein ætlan var fyri alt landið. Men nú eru tær skipaðar lokalt, sigur sandoyarprestur.

Sjálvur hevur hann verið við á onkrum fundi, sum sýslumaðurin hevur skipað fyri. Og hann metir, at tað er neyðugt, at millum annað prestur er við í eini slíkari tænastu, tá kreppustøður stinga seg upp.

Tað eru nógv fólk, bæði offur, avvarðandi og ikki minst bjargingarfólk, sum hava brúk fyi kreppuhjálp, tá okkurt ógvusligt hendir, sigur Jákup Reinert Hansen, prestur.

Sálarfrøðingar og onnur geva góða hjálp. Men ofta vilja fólk eisini koma inn á tað andaliga í slíkum førum. Og har er prestur upplagdur at hjálpa.

Tað er ikki tí. Í føroyinginum liggur, at tað verður ikki tosað so nógv um slík ting. Hetta er nakað, ein heldur inni við seg sjálvan. Men tað er skeivt, sigur sandoyarprestur. Tí tað kann skaða sálina almikið, at ein bara tekur inn í seg sjálvan. Tað er harðliga brúk fyri at lasta av eisini.

Jákup Reinert Hansen sigur, at prestarnir fáa útbúgving til slíkar umstøður á pastoralseminarinum í samband við teologútbúgvingina. Eisini hava føroysku prestarnir seinnu árini havt fleiri skeið, har teir hava viðgjørt hesi evni. Tað er danski presturin og psykoterapeuturin, Bent Falk, sum hevur hildið hesi skeiðini, sigur Jákup Reinert Hansen, formaður í føroyska Prestafelagnum.

